

# PRAKTISKU OG ESTETISKU LÆRUGREINARNAR

## STØÐULÝSING OG TILMÆLI

Henny Dánialsdóttir, ráðgevi í Námi

**Arbeiðsbólkur:**
Malan Dahl Johansen, Katja Kjartansdóttir, Guðni Petsi Andreasen, Dánjal Husgaard Kjærbo, Høgni Lamhauge, Gunnvá Højgaard Mohr, Jan Bostad Anthoniussen, Tóra Joensen, Marta á Lakjuni, Magni Jakobsen, Harriet Poulsen, Maria Ziska og Elly Johannesen.

NÁM

## Formæli

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur heitt á Nám um at dagføra allar námsætlanir til fólkaskúla og miðnám. Viðvíkjandi praktisku og estetisku lærugreinunum í fólkaskúlanum, t.e. smíð, tónleikur, heimkunnleiki, hondarbeiði og myndlist, metir Nám tó, at nakrar avbjóðingar eru við núverandi skipan, sum greiða má fáast á, áðrenn farið verður undir at dagføra námsætlanirnar.

Nám setti tí ein arbeiðsbólk við lærarum og ráðgeva at gera støðulýsing og tilmæli. Høvuðsendamálið við støðulýsingini er fyrst og fremst at fáa greiðu á, hvørjir trupulleikar eru við núverandi skipan, og síðani koma við møguligum tilmælum um broytingar og uppskot til nýggja skipan av praktisku og estetisku lærugreinunum.

# Innihaldsyvirlit

Arbeiðsgongdin ..... 4
Skipan av arbeiðsbólki ..... 6
Skipan av verkstovudøgunum ..... 6
Inngangur ..... 7
Lærugrein ella fakøki ..... 10
**Støðulýsing – Praktisku og estetisku lærugreinarnar í skjølum** ..... 11
Núverandi skipan av lærugreinunum ..... 11
Skúlarnir avgera, hvat er á tímatalvuni ..... 13
Grunddeild: ..... 13
Miðdeild: ..... 13
Hádeild: ..... 13
P-fakskipanin ..... 14
Samanumtøka ..... 14
**Støðulýsing – Praktisku og estetisku lærugreinarnar í verki** ..... 15
Avbjóðingar við p-fakskipanini ..... 15
**Yvirskipaðir trupulleikar av praktisku og estetisku lærugreininum** ..... 16
Ov stutt tíðarskeið ..... 17
Næmingatal ..... 17
Eingin reyður tráður ..... 17
Praktiska og estetiska lærugreinaøkið í hádeild ..... 17
Faklærarar ..... 18
Førleikamenning ..... 18
Tann góða undirvísingin ..... 18
**Uppskot um broytingar** ..... 19
Tíma- og lærugreinabýtið ..... 20
**Frá *heimkunnleika* til *matur & heilsa*** ..... 21
Fyrimunir og vansar ..... 22
**Tilevning ella myndlist?** ..... 22
Fyrimunir og vansar ..... 22
**Praktisku og estetisku lærugreinarnar í hádeild** ..... 23
**Ein nýggjan leist** ..... 25
**Uppskot um nýggjan leist** ..... 26
Áhaldandi læring frá 1. til 9. floksstig ..... 27
**Pilotverkætlan** ..... 28
**Niðurstøða og tilmæli** ..... 29

Fylgiskjal 1 – Viðkomandi gransking og frágreiðingar ..... 32
Fylgiskjal 2 – Dømi um tímatalvur hjá 2. fl. ..... 33
Fylgiskjal 3 – Dømi um tímatalvur hjá 5. fl. ..... 36
Fylgiskjal 4 – Dømi um tímatalvur hjá 8. fl. ..... 38
Fylgiskjal 5 – Tíma- og lærugreinabýti: Norra, Svøríki, Danmark, Føroyar, Finnland ..... 40

## Arbeiðsgongdin

Fyri at finna fram til, júst hvørjir trupulleikar eru við núverandi skipan, mannaðu vit ein arbeiðsbólk. Arbeiðsbólkurin varð mannaður av fólkaskúlalærarum, ið arbeiða við praktisku og estetisku lærugreinunum á ymsum skúlum kring landið. Arbeiðsbólkurin hevur drúgvar royndir innan eina ella fleiri lærugreinar, kennir núverandi skipan og fær greitt okkum frá egnum royndum í verki.

Arbeiðsbólkurin varð boðin á tríggjar verkstovudagar, ið vóru hildnir á Føroya Fólkaháskúla.

Fyri at tryggja, at vit komu til kjarnuna, vóru dagarnir skipaðir soleiðis, at arbeiðsbólkurin fekk arbeiðssetningar at halda seg til, so øll øki í teirra lærugreinum bleiv viðgjørt.

Á fyrsta degi var dentur fyrst lagdur á at lýsa yvirskipaðar trupulleikar við núverandi skipan, og síðani varð farið inn í hvørja einstaka lærugrein.

Á næsta degi viðgjørdu tey trupulleikarnar og hugdu at praktiska og estetiska lærugreinaøkinum sum ein heild í føroyska fólkaskúlanum.

Triðja dagin var tikið samanum, og loysnir og uppskot vóru viðgjørd. Verkstovudagarnir endaðu við eini framløgu av niðurstøðum og tilmælum fyri áhugabólkum.

**Arbeiðsbólkurin:**

Malan Dahl Johansen

Katja Kjartansdóttir

Guðni Petsi Andreasen

Dánjal Husgaard Kjærbo

Høgni Lamhauge

Gunnvá Højgaard Mohr

Jan Bostad Anthoniussen

Tóra Joensen

Marta á Lakjuni

Magni Jakobsen

Harriet Poulsen

Maria Ziska

Elly Johannesen.

## Skipan av arbeiðsbólki

Arbeiðsbólkurin er mannaður av faklærarum við drúgvum royndum og vitan innan eina ella fleiri lærugreinar innan praktiska og estetiska lærugreinaøkið.

## Skipan av verkstovudøgunum

Fyri at koma til dýpdina var neyðugt at skipa dagarnar í tríggjar partar.

**Fyrsta dagin tók arbeiðsbólkurin hesi evni upp:**

- Trupulleikar og avbjóðingar við núverandi skipan – handaverk og list og hádeild
- Trupulleikar og avbjóðingar í hvørjari einstakari lærugrein
- Samanumtøka, kjak og heimasetningur

**Næsta dagin viðgjørdi arbeiðsbólkurin:**

- Hvaðani stava trupulleikarnir?
- Á hvønn hátt loysa vit best trupulleikarnar?
- Tann góða undirvísingin – Hvat eydnast væl?
- Hugsað dømi um loysnir

**Síðsta dagin tók arbeiðsbólkurin samanum:**

- Hvat vilja vit broyta?
- Hvat hava vit tørv á?
- Hvat ber til at seta í verk her og nú?
- Hvat kann setast í verk langtíðarætlað?

**Framløga fyri innbodnum** við samanumtøku, niðurstøðum og tilmælum frá arbeiðsbólkinum.

## Inngangur

Praktiska og estetiska lærugreinaøkið hevur í mong ár verið til kjak; bæði í fjølmiðlunum og frá politiskari síðu. Frá lærarayrkinum og avvarandi myndugleikum hevur leingi verið varpað ljós á, at tímatalið er ov lágt, og at *p-fakskipanin*[1] forðar fyri áhaldandi læring. Frá politiskari síðu hevur lærugreinaøkið eisini verið til kjak, har tað m.a. bleiv stungið út í kortið, at praktisku og estetisku lærugreinarnar skuldu styrkjast. Hetta sæst m.a. í uppskoti til broytingar í fólkaskúlalógini frá 20.12.2024, har lagt verður upp til, at skúlin skal menna albúgving, kveikja skapandi og verkliga lærihugin hjá børnunum, og at javnvág skal vera millum hugvísindi, náttúruvísindi og skapandi læru.

Í 2012 var Anne Bamford í Føroyum og gjørdi eina støðulýsing av praktisku og estetisku lærugreinunum í fólkaskúlanum. Niðurstøðurnar vóru ikki hugagóður lesnaður. Føroyski fólkaskúlin dumpar á hesum øki. Bamford legði m.a. stóran dent á, hvussu jaliga ávirkan hesar lærugreinarnar hava á bæði fakligu menningina og albúgvingina hjá einstaka neminginum.

Men hóast greið tilmæli um, á hvønn hátt vit kundu styrkja lærugreinarnar, er einki hent innan økið. Skúlar leggja sínar egnu ætlanir; nøkur gera handaverk og list um til aðra lærugrein, har trupult er at síggja, hvar listin og handaverkið eru, og onnur uppfinna nýggjar lærugreinar aftur at verandi lærugreinum, so tíðin til hvørja einstaka lærugrein gerst enn styttri. Nøkur koma úr fólkaskúlanum eftir 9 ár við stoltleika at kunna meistra eitt ella fleiri handverk, meðan onnur koma út eftir 9 ár og hava aldri hildið á einum hamara. Tá býtið er so ójavnt, so er okkurt, sum bendir á, at núverandi skipan ikki stendur mát við nútímans krøv til fólkaskúlan.

Okkara grannalond hava fyri langari tíð síðani sæð týdningin av praktiska og estetiska lærugreinaøkinum og hava bæði nýhugsað, styrkt og givið fakligt lyft í fleiri umførum – meðan vit í Føroyum framvegis koyra eftir eini skipan, ið bleiv tikin í brúk fyrst í 90-árunum, og aldrin hevur virkað til fulnar. Tað er ikki uttan orsøk, at okkara grannar raðfesta praktiska og estetiska lærugreinaøkið so høgt; gransking vísir, at tað er stórur samanhangur millum praktiska og estetiska lærugreinaøkið, og hvussu næmingar trívast, mennast og læra.

**Gransking vísir, at praktiska og estetiska lærugreinaøkið m.a. hevur hesar fyrimunir:**

**21. aldar førleikar**
Næmingarnir menna kreativar førleikar, nýhugsan, kritiska hugsan og arbeiða stigvíst við at loysa trupulleikar. Júst hesir førleikar eru kjarnuførleikar í einum samfelag, har vitlíki og tøkni fyllir alsamt meira. Her eru estetisku lærugreinarnar loysnin til komandi arbeiðsmarknaðin, tí her verður arbeitt við førleikum, ið vitlíki ikki kann eftirlíkna, nemliga at sansa, menna empati, moral, kropsliga vitan og at hugsa autentiskt, moralskt, mentanarligt og etiskt. (UNESCO - Road Map for Arts Education).

---

[1] P-fak stendur fyri praktiske fag og er ein skipan, har allar praktisku og estetisku lærugreinarnar er lagdar í somu tímajáttan. Skúlin skipar so sjálvur undirvísingina gjøgnum árið.

**Tvørfaklig læring**

Estetiskar lærugreinar og lærugongdir samansjóða vitan og sansaligar upplivingar, umframt at tær skapa møguleika fyri at knýta náttúru- og hugvísindi við skapandi arbeiði. Hetta mennir kritiska hugsan og gevur næmingunum eina djypri fatan av tí lærda. (K. Knudsen).

**Albúgving**

Praktisku og estetisku lærugreinirnar geva næmingunum førleikar í at úttrykkja kenslur og styrkir teirra samleika, við at tey síggja seg sjálv í mun til ta mentan og samfelag, tey dagliga ferðast í. Nýggjasta granskingin vísir, at lærugreinarnar hava eisini sera jaliga ávirkan á sjálvsálit og trivnað, og tað hevur beinleiðis ávirkan á arbeiðslag og motivatión og gevur næmingunum eina kenslu av at hoyra til ein felagsskap í skúlanum. (T. Chemi) (A. Bamford).

**Handaligar førleikar**

Í eini tíð har tøkni og vitlíki mennast við rúkandi ferð, er tað umráðandi at varðveita og dyrka handaligu førleikarnar. Handaligir førleikar styrkja fatan av rúmi, tilfari, formi og skapi. (K. Knudsen) (K. Robinson).

**Mentan og lívlong læring**

Praktisku og estetisku lærugreinarnar leggja grund fyri mentanarliga fatan. Við at skilja og fata okkara mentan eru næmingarnir við til at varðveita og menna mentanarlig virði, samstundis sum tey mennast sum menniskju alt lívið. (A. Bamford) (T. Chemi).

**Kognitiv mynstur**

Gransking vísir, at tað at skapa, sniðgeva og arbeiða við fjølbroyttum tilfari styrkir kognitivu førleikarnar og gevur næmingunum knagar at heingja vitanina á. Somuleiðis vísir gransking, at næmingarnir bæði minnast betur og megna betur at hugsavna seg. Kognitivu mynstrini, ið næmingarnir menna í skapandi lærugreinunum, vera yvirførd til aðrar støður og aðrar lærugreinar, ið sæst aftur í læriúrtøkuni í hinum lærugreinunum. (K. Knudsen).

**Økir um trivnað og sjálvsmynd**

Gransking[2] vísir, at myndlist, smíð, dansur, handarbeiði, tónleikur, leiklist o.a. hevur hesa ávirkan:

- Økir um sjálvvirði og sjálvsálit.
- Næmingarnir megna at seta orð á stórar kenslur og at regulera innara kenslulívið.
- Fyribyrgir angist, strongd og tunglyndi.
- Styrkir sosialar relatiónir og tað at hoyra til ein felagsskap.
- Næmingarnir megna betur at handfara mótgang og hava størri handlikraft.
- Mennir teirra samleika og vón fyri framtíðina.
- Listin gevur eitt trygt rúm, har tey fáa arbeitt við at úttrykkja seg.
- Estetiskar tilgongdir geva djypri læring og meining.

[2] *Når kunst og kultur fremmer unges trivsel* – International viden og regionale erfaringer 2025
naar_kunst_og_kultur_fremmer_unges_trivsel.pdf

- Aktiverar kroppin og sansaligheit – tigandi vitan verður ítalusett í úttrykkum.

Samanumtikið gevur praktiska og estetiska lærugreinaøkið næmingunum eina breiða viftu av førleikum, ið fyrireikar og brynjar tey til eina framtíð, vit ikki kenna. Tí er eyðsæð, at praktiska og estetiska lærugreinaøki eigur at hava høga raðfesting í okkara skúlaskipan. Lærugreinaøkið eigur at vera uppraðfest, umskipað og nýhugsað, so dygd kann fáast í undirvísingina. Tað er við tí endamáli, at hendan støðulýsing og hesi viðmæli eru skrivað.

Er ynski um at fara djypri inn í fyrimunirnir við praktiska og estetiska lærugreinaøkinum, er ein listi við viðkomandi gransking, ið liggur til grund fyri tilmælunum, lagdur sum fylgiskjal.

## Lærugrein ella fakøki

Ofta er torført at skilja ímillum, nær vit brúka heiti *handaverk og list*, og nær vit brúka heitið *praktisku og estetisku lærugreinarnar*. Tað er umráðandi, at vit tosa sama mál, um støðulýsingin skal skiljast á rættan hátt.

**Praktisku og estetisku lærugreinarnar** er eitt felagsheiti fyri eina røð av lærugreinum í fólkaskúlanum, sum eru kravdar á ymsum floksstigum og bodnar út sum vallærugreinar á hægru floksstigunum. Lærugreinarnar umfata tónleik, tilevning, myndlist, handarbeiði, smíð og heimkunnleika - umframt ymiskar vallærugreinar í hádeildini.

**Handaverk og list** er ein lærugrein, ið samansjóðar allar omanfyri nevndar lærugreinar. Í námsætlanini[3] stendur soleiðis um lærugreinina:

> «Handaverk og list er lærugrein, ið fevnir um fakini myndlist og evning, tónleik, sang og ljóðføri, handarbeiði, smíð umframt heimkunnleika.»
>
> *Námsætlan fyri Handaverk og list 1-7 - Samleiki*

Støðulýsingin tekur støði í at lýsa og viðgera praktiska og estetiska lærugreinaøkið sum heild í føroyska fólkaskúlanum, umframt at viðgera, hvussu lærugreinin *handaverk og list* og p-fakskipanin rigga í verki. Heitið *praktiska og estetiska lærugreinaøkið* er eisini í tráð við norðurlendsku felagsheitini í hesum lærugreinaøkinum, og ger tað tí lættari at samanbera og tosa sama fakmál í norðurlendskum samanhangi.

Danmark – *Praktiske og musiske fag*
Norra – *De praktiske og estetiske fagene*
Svøríki – *Praktisk-estetiska ämnen - Estetiska ämnen*
Ísland – *List og handverk* á tímatalvuni – *Estetiska lærugreinaøkið* í fakpráti
Áland – *Praktisk-estetiska ämnen*
Finnland - *Kunst og færdighedsfag*

---

[3] https://namsaetlanir.fo/folkaskuli/handaverk-og-list

# Støðulýsing – Praktisku og estetisku lærugreinarnar í skjølum

Tað er ikki samsvar millum tað, ið stendur í skjølum, og tað, ið verður útint úti á skúlunum. Tí er støðulýsingin deild í tveir partar. Fyrri partur lýsir praktiska og estetiska lærugreinaøkið, sum tað er skipað og orðað í fólkaskúlalógini og í námsætlanum. Seinni partur lýsir lærugreinaøkið út frá, hvussu tað virkar í verki, og lýsir og viðger trupulleikar, ið arbeiðsbólkurin vísti á á verkstovudøgunum á Føroya Fólkaháskúla.

## Núverandi skipan av lærugreinunum

Fyrstu sjey árini í fólkaskúlanum er praktiska og estetiska lærugreinaøkið skipa sum ein lærugrein, kallað *handaverk og list*.

Fólkaskúlalógin ásetir, at allar fimm lærugreinarnar í *handaverki og list* eiga at vera á 1. – 7. flokksstigi[4]. Á 8.-10. flokksstigi er lærugreinaøkið ikki longur krav, tey kunnu ístaðin velja millum ymsar lærugreinar.

> 4) Handaverki og list:
> a) Sangi og tónleiki: 1.-7. skúlaári.
> b) Tilevning: 1.-7. skúlaári.
> c) Handarbeiði: 1.-7. skúlaári.
> d) Smíð: 1.-7. skúlaári.
> e) Heimkunnleika: 1.-7. skúlaári.

Í § 9 stendur: *"Umframt ta undirvísing, ið skal vera boðin sambært §§ 5, 7 og 8 vera hesar valgreinir og hesi evni at standa næmingunum í 8.-10. flokki í boði: sjóvinna, landbúnaður, tekstviðgerð/rokniark, tøknifrøði, miðlar, ljósmyndalæra, filmskunnleiki, drama, tónleikur, tilevning, heimkunnleiki, handarbeiði, smíð, motorlæra, arbeiðskunnleiki."*

Í fyrstu atløgu kann hetta síggja sera jaligt út. Sambært fólkaskúlalógini hava føroyskir fólkaskúlanæmingar fimm praktiskar og estetiskar lærugreinar á tímatalvuni í grund- og miðdeild, og í hádeildini kunnu tey velja ímillum ikki færri enn fimtan ymiskar lærugreinir innan praktiska og estetiska lærugreinaøkið.

Í námsætlanini eru greið førleikamál fyri allar fimm lærugreinarnar. Allar hava tær bæði samleika og førleikamál, ið tryggja stigvøkstur í lærigongdini. Men hyggja vit nærri at tíma- og lærugreinabýtinum, so er ikki samsvar millum fólkaskúlalógina og námsætlanirnar.

Myndlist:

> Lærugreinin myndlist fevnir um 1.-7. floksstig í fólkaskúlanum, sum kravd lærugrein, við 30 klokkutímum á hvørjum stigi, ella samanlagt 180 klokkutímum í 6 ár, umframt sum valgrein í 7. flokki við 60 klokkutímum. Harumframt er lærugreinin myndlist valgrein í 8., 9. Og 10. flokki í fólkaskúlanum við 180 klokkutímum samanlagt.

[4] https://logir.fo/Logtingslog/125-fra-20-06-1997-um-folkaskulan-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-34-fra-28#chapter-dc0743cf-0e97-4d7f-86e5-1af772295b5b

Tónleikur:

Lærugreinin tónleikur fevnir um 1.-7. floksstig í fólkaskúlanum, sum kravd lærugrein við 30 klokkutímum á hvørjum stigi, ella samanlagt 180 klokkutímum í 6 ár, umframt sum valgrein í 7. flokki við 60 klokkutímum. Harumframt er lærugreinin tónleikur valgrein í 8., 9. og 10. flokki í fólkaskúlanum við 180 klokkutímum samanlagt.

Heimkunnleiki:

Lærugreinin heimkunnleiki er kravd lærugrein í 6. flokki við 90 klokkutímum. Harumframt er heimkunnleiki valgrein í 7.-10. flokki við 60 klokkutímum á hvørjum stigi. Einstaki skúlin ger av, hvørt undirvíst verður í heimkunnleika bæði í 8. og 9. flokki (60 klokkutímar hvørt árið), ella bert tað eina árið, við íalt 120 klokkutímum.

Í heimkunnleika eru endalig førleikamál fyri 8.-9. flokk, tá ið næmingur hevur møguleika at fara til próvtøku.

Handarbeiði:

Handarbeiði er kravd lærugrein í 4.-7. flokki og er lutvíst partur og framhald av lærugreinini handaverki og list. Undirvíst verður 60 klokkutímar á hvørjum stigi. Handarbeiði er harumframt valgrein í 8. og 9. flokki, og undirvíst verður 60 klokkutímar á hvørjum stigi, ella 120 klokkutímar á einum stigi.

Smíð:

Smíð er kravd lærugrein í 4.-6. flokki og valglærugrein í 7., 8., 9. og 10. flokki. Árliga klokkutímatalið í smíð er 30 tímar í 4.-6. flokki. Tímatalið í 7., 8. og 9. flokki er 180 klokkutímar býtt yvir 1, 2 ella 3 ár. Í 10. flokki, har lærugreinin er breytalærugrein, er árliga klokkutímatalið 140.

Samanumtikið er munurin hesin:

| | Fólkaskúlalógin | | Námsætlanin |
|---|---|---|---|
| Myndlist | 1.- 7.fl | 1.- 6.fl | 30 klokkutímar |
| Tónleik | 1.- 7.fl | 1.- 6.fl | 30 klokkutímar |
| Heimkunnleiki | 1.- 7.fl | 6. fl | 90 klokkutímar |
| Handarbeiði | 1.- 7.fl | 4.- 7.fl | 60 klokkutímar |
| Smíð | 1.- 7.fl | 4.- 6.fl | 30 klokkutímar |

Í námsætlanini fyri *handaverk og list* stendur:

> *"Harumframt verða námsætlanirnar fyri lærugreinarnar myndlist, tónleik, handarbeiði, smíð og heimkunnleika nýttar í tann mun, **einstaki skúlin ella lærarin velur at skipa undirvísingina í handaverki og list**, har ímillum myndlist, tónleiki, handarbeiði, smíð og heimkunnleika."*
>
> *Fólkaskúlalógin*

Út frá hesum er eyðsæð, at tað liggur skúlunum frítt at leggja lærugreinarnar í *handaverk og list,* sum teimum lystir. Tað er ei heldur undarligt, tí tað er ein ómøgulig uppgáva hjá skúlunum, tá tað ikki er samanhangur millum lóg og námsætlan. Ein annar trupulleiki er, at lærugreinarnar fáa tillutað eitt felags tímatal. Lága tímatalið skal býtast millum allar fimm lærugreinarnar – í verki hongur hetta býtið ikki saman, tá tað skal skipast á eini tímatalvu.

## Skúlarnir avgera, hvat er á tímatalvuni

Av tí at skúlarnir ikki hava ein felags leist fyri praktiska og estetiska lærugreinaøkið er torført at siga júst, hvussu skúlarnir skipa seg. Kjakið á verkstovudøgunum lýsti, hvussu skúlarnir oftast gera, og hyggja vit inn á tímatalvunar hjá ymsu skúlunum, ber til at siga nakað um, hvussu flestu skúlarnir skipa økið.

### Grunddeild:

Vanligt er, at næmingar í grunddeild (1.-3. fl) hava ein ella tveir undirvísingartímar í sang og/ella myndlist.

Sí Fylgiskjal 1 – Dømi á tímatalvur fyri 2. fl – Talvurnar vísa dømi um, hvussu tímatalvan á 2. floksstigi sær út á seks ymiskum skúlum. Heitini eru ymisk: *handaverk og list, kór, tónleik, sang, tilevning, myndlist, kreativt verkstað o.s.fr.*

Tað er ofta tilvildarligt, hvør lærugrein er í grunddeildini, og oftast er tað tongt at, hvørjar lærarar flokkurin hevur. Um tað er ein tónleikalærari, so fær flokkurin tónleik á tímatalvuna, er tað ein "kreativur" lærari, fær flokkurin tilevning.

### Miðdeild:

Í miðdeild (4.-7. fl) eru lærugreinarnar skipaðar sum p-fakskipan (hesa skipanina koma vit nærri inn á seinni.). Lærugreinarnar, ið oftast eru á tímatalvuni í miðdeildini eru tær fimm: heimkunnleiki, tónleik, smíð, handarbeiði og myndlist. Sí dømi Fylgiskjal 2 – Dømi á tímatalvu fyri 5. fl.

Nakrir skúlar hava fýra tímar á tímatalvuni, meðan aðrir hava tveir tímar ella tríggjar tímar. Flestu skúlar hava tríggjar ella fýra lærugreinir í umfari. Tí er eyðsæð, at tað eru ein ella tvær lærugreinar, ið ikki er á tímatalvuni.

### Hádeild:

Í hádeild (8.-9. fl.) er eingin kravd lærugrein innan praktiska og estetiska lærugreinaøkið. Ístaðin kunnu næmingarnir velja ímillum fleiri lærugreinir. Tær, ið oftast eru at velja ímillum, eru: tónleikur, heimkunnleiki, smíð, myndlist, handarbeiði. Afturat hesum sæst, at nakrir skúlar bjóða aðrar lærugreinar, t.d. sjóvinnu ella miðlar. Sí Fylgiskjal 3 – Dømi á tímatalvu fyri 8. fl.

Tað er ymiskt, hvussu nógvar vallærugreinar verða bodnar út, men felags er, at tær allar eru tveir undirvísingartímar hvør. Nøkur frávik eru tó. Nakrir skúlar hava seks tímar, men tá er talan um serligar verkætlanir, ella at skúlin av sínum eintingum raðfestir økið og setur tímar inn, m.a. við at fáa kommununa at gjalda fyri eyka tímar.

## P-fakskipanin

Í miðdeild skifta næmingarnir millum fimm lærugreinar øll árini í tí, vit kalla p-fakskipanin[5]. P-fakskipanin varð innførd fyrst í 90-árunum, óivað við íblástri frá Venjingarskúlanum, sum um tað mundið brúkti hesa skipan. Námsætlanin fyri *handaverk og list* er sett í gildið um sama mundi, sum danir komu við nýggju lærugreinini *håndværk og design*. Tað sær út til, at vit í Føroyum hava brúkt sama heitið, uttan tó at tillaga námsfrøðiliga og fakliga innihaldið.

**Dømi um skipan:** Næmingur á 4. floksstigi hevur smíð fram til heystferiuna, tónleik fram til jólaferiuna, handarbeiði fram til páskaferiuna og heimkunnleika fram til summarferiuna.



Hetta er galdandi fyri øll fýra árini í miðdeildini. Nakrir skúlar leggja fleiri lærugreinar afturat skipanini, t.d. teld, útilív og talv. Tað er eyðsæð, at jú fleiri lærugreinar eru í skipanini, jú styttri tíð er til hvørja lærugrein.

Her er vert at nevna, at p-fakskipanin hvørki er nevnd í fólkaskúlalógini ella í námsætlanini fyri handaverk og list. P-fakskipanin er altso ein skipan, sum leiðslurnar sjálvar velja at brúka á sínum skúla.

Hugsast kann, at ein av orsøkunum til tað er, at tað er ein ómøgulig uppgáva at fáa fimm lærugreinar á tímatalvuna við tillutaða tímatalinum.

## Samanumtøka

Hóast lærugreinarnar sambært fólkaskúlalógini eru kravdar frá 1. til og við 7. floksstig, so verður tað ikki útint úti á skúlunum. Tað, ið oftast er á tímatalvuni á 1. – 3. floksstigi, er tónleikur og tilevning. Síðani rotera tey í stutt tíðarskeið millum 5 lærugreinir øll trý árini í miðdeildini, og í hádeildini dettur lærugreinaøkið heilt burtur og kann bert veljast sum vallærugreinar.

Yvirskipað eru bæði innihald og tímatal latin upp til einstaka skúla at skipa. Tí er torført at gera eina neyvari lýsing av, hvussu tað er skipað í føroyska fólkaskúlanum.

[5] Danska *p-fak* stendur fyri *praktiske fag*

Samanumtikið er tað er ikki samljóð millum fólkaskúlalógina og tíma- og lærugreinabýtið – tað ber snøgt sagt ikki til at halda seg til lógina við tillutaða tímabýtinum. Tað er eisini eyðsæð, at við núverandi skipan av praktiska og estetiska lærugreinaøkinum er tað sera ymiskt frá skúla til skúla, hvat er á tímatalvuni. Hvat næmingarnir fáa boðið í føroyska fólkaskúlanum er tongt at hvørjum skúla tey ganga í - ikki at fólkaskúlalógini.

**Mælt verður til, at:**

Tímabýtið verður tilskilað hvørji einstakari lærugrein. Hetta er fyri at tryggja, at tað ikki er upp til einstaka skúlan at avgera, *um* og *nær* næmingarnir hava praktisku og estetisku lærugreinarnar.

Endurskoða fólkaskúlalógina og námsætlanirnar fyri praktisku og estetisku lærugreinarnar, so tað er samsvar millum fólkaskúlalógina og námsætlanirnar.

Tilluta fleiri tímar til lærugreinarnar, so tað letur seg gera í verki.

# Støðulýsing – Praktisku og estetisku lærugreinarnar í verki

Hesin parturin av støðulýsingini lýsir fyrst avbjóðingarnar við p-fakskipanini, sæð frá sjónarmiðinum hjá faklærarum, sum arbeiða í skipanini. Síðani verður farið inn í hvørja einstaka lærugrein, har hugt verður eftir, um tað er samljóð millum málini í námsætlanini og tað, sum gongur fyri seg í verki. Síðani verður praktiska og estetiska lærugreinaøkið í hádeildini lýst.

## Avbjóðingar við p-fakskipanini

*P-fakskipanin* er illa lýdd millum faklærararnar, og tað er ikki uttan orsøk.

Felags fyri praktisku og estetisku lærugreinarnar er, at tær byggja á kropsliga læring. Kropslig læring krevur tíð, nærlagni og venjing at læra til fulnar, og er tað nakað, sum ikki er til staðar í *p-fakskipanini*, so er tað tíð. Skiftini frá lærugrein til lærugrein eru alt ov knøpp. Tað er ikki stundir at læra nakað til fulnar, og næmingarnir uppliva ikki at *meistra* nakað. Hetta ávirkar stórliga áhugan hjá næmingunum, tí tey fáa ikki høvi at fordjúpa seg í einum handverki.

Stutta tíðin hevur eisini stóra ávirkan á fakliga innihaldið í hvørjari lærugrein. Undirvísingin má tilrættisleggjast eftir, hvat næmingarnir náa at fáa liðugt, áðrenn tey skulu skifta til næstu lærugrein. Faklærararnir greiða frá, at tey ofta enda við at gera okkurt *nemt* og skjótt, tí annars fáa næmingarnir ongan lut við heim til foreldrini.

Á verkstovuni á Føroya Fólkaháskúla bleiv ikki krógvað, at faklærarar ikki brúka námsætlanina í síni lærugrein. Ikki tí tey ikki vilja, men tí tað gevur heilt einfalt ikki meining – námsætlanin er alt ov rúgvismikil at náa upp á so stutta tíð. Eisini varð viðmerkt, at førleikamálini ikki eru realistisk, t.d. kanst tú sum føroysklærari hyggja í námsætlanina fyri at vita, hvat ein næmingur eigur at

duga á 4. floksstigi, men tað er als ikki eftirfarandi í praktisku og estetisku lærugreinunum. Faklærararnir greiða frá, at tey mugu byrja á grundstigi á hvørjum ári - í øllum árgangum. Har er hvørki faklig ella handalig menning, tí tað eru ikki stundir til tað.

Fakligheit krevur tíð og karmar, og so leingi *p-fakskipanin* er í brúk, kunnu vit ikki at tosa um at menna kritiska hugsan, handaligar førleikar og føroyskan siðaarv, sum námsætlaninrnar annars leggja upp til.

At vit í føroyska fólkaskúlanum hava ov fáar tímar til praktisku og estetisku lærugreinarnar er ikki nakað nýtt. Í 2012 skrivar Anne Bamford soleiðis í síni rapport:

> *"Sjálvt innanfyri teir ásettu tveir tímarnar kunnu børn uppliva at vera nógv avbrotin. Tey kunnu til dømis hava nakrar fáar vikur í tónleiki, nakrar fáar vikur í køkinum, nakrar fáar vikur til smíð og so framvegis. Tá so at siga øll læring steðgar, tá ið barnið kemur í áttanda flokk ella fyrr, fáa føroysk børn í veruleikanum nógv minni undirvísing í list enn altjóða miðaltalið, og* ***tað er ivasamt, um læringin lýkur grundleggjandi dygdarkrøv****. UNESCO Road Map for Arts Education leggur stóran dent á, hvussu týdningarmikið tað er, at list er samanhangandi og áhaldandi. Burtursæð frá nøkrum fáum undantøkum er hetta ikki so í føroyskum skúlum."*
>
> (Bamford, 2012)

Einki er hent innan økið, síðan rapportin kom út, og tí er trupulleikin líka stórur í dag, um ikki størri, enn hann var í 2012.

Samanumtikið spennir *p-fakskipanin* bein fyri bæði fakligar og handaligar menning, og tí mæla vit staðiliga til at avtaka *p-fakskipanina*.

**Mælt verður til at:**

Avtaka *p-fakskipanina* og menna ein nýggjan leist.

Endurskoða lærugreinaøkið sum heild, so samsvar er millum lóg, námsætlanir og tímabýti.

Skapa samanhangandi og áhaldandi læring frá 1. til 9. floksstig, so vit lúka grundleggjandi dygdarkrøv.

## Yvirskipaðir trupulleikar av praktisku og estetisku lærugreininum

Fleiri trupulleikar ganga aftur í øllum lærugreinunum; tað er m.a. ov lágt tímatal, ov stutt tíðarskeið, ov fáar hendur og vantandi førleikamenning. Niðanfyri er ein útgreining av yvirskipaðu trupulleikunum, ið ganga aftur í øllum lærugreinunum.

## Ov stutt tíðarskeið

Lága tímabýtið ger tað nærum ómøguligt at fáa rúm fyri øllum lærugreinunum.

Núverandi skipan, p-fakskipanin, avmarkar læritilgongdina. Tíðarskeiðið er alt ov knapt til at menna kritiska hugsan, skapandi tilgongdir og handaligar førleikar, ið námsætlanin leggur upp til.

Arbeiðsbólkurin er á einum máli um, at p-fakskipanin í stóran mun førir við sær, at lærugreinarnar gerast fakliga grunnar. Hetta ávirkar hugin at undirvísa í lærugreinunum. Tað gongur út yvir dygdina í undirvísingini, og tískil er eisini torført at kveikja áhugan hjá næmingunum fyri handaliga økinum.

## Næmingatal

Faklærarar vísa á, at tey hava trupult við at náa runt til allar næmingarnar. Serliga eru tað tónleikur og handarbeiði, ið krevja nógva *ein til ein* undirvísing. Vanliga sigur man 12 næmingar pr. lærara í praktisku og estetisku lærugreinunum, men hetta verður ofta ikki yvirhildið. 12 næmingar eru eisini í meira lagi, um talan er um handarbeiði og tónleik.

## Eingin reyður tráður

Sum lærugreinaøkið er skipað nú, er torført at menna nakrar fakligar førleikar, tí har er eingin áhaldandi læring. Hetta sæst aftur í øllum praktisku og estetisku lærugreinunum, har lærararnir vísa á, at tey mugu byrja á grundstøði hvørt ár. Hetta hevur við sær, at t.d. næmingar kunnu vera í hádeild og ikki duga at tráa eina nál, halda einum hamara ella grundleggjandi litlæru.

Lærararnir vísa eisini á, at tey ikki brúka námsætlanirnar, tí tað er ofta av tilvild, hvat næmingarnir duga á hvørjum floksstigi. Altso ber ikki til at ganga út frá, at ein næmingur á 6. floksstigi dugir tað, ið námsætlanin sigur hann/hon eigur at duga, og tí ber illa til at fylgja námsætlanini.

## Praktiska og estetiska lærugreinaøkið í hádeild

Arbeiðsbólkurin vísir eisini á, at tá næmingarnir fara úr miðdeild, er so at siga eingin skapandi læra at hóma á tímatalvuni. Í staðin kunnu næmingarnir velja eina praktiska/estetiska lærugrein, eins og tey kunnu velja t.d. alis- og evnafrøði og týskt. Trupulleikin her er, at valærugreinarnar ofta liggja samstundis á tímatalvuni. Og skulu næmingarnir velja ímillum týskt og eina praktiska/estetiska lærugrein, so velja tey sjálvsagt týskt, sum er upptøkukrav til víðari lesnað.

Í uppskotinum til broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan verður í innganginum nevnt, at samgongan hevur sett sær sum mál: *at skúlin skal menna albúgving,* ***kveikja skapandi og verkliga lærihugin*** *hjá børnunum, og at* ***javnvág*** *skal vera millum hugvísindi, náttúruvísindi og skapandi læru*. Víðari í sama uppskotið sendur: *at nýggja uppskotið skal* ***styrkja*** *handaligu og skapandi lærugreinirnar*. Hetta sæst tíverri ikki í hádeildini, har praktiska og estetiska lærugreinaøkið er tikið heilt burtur sum kravd lærugrein. Her er eingin javnvág at síggja.

## Faklærarar

Á verkstovuni á Føroya fólkaháskúla varð fleiri ferðir komið inn á týdningin av at hava ein faklærara. Tað bleiv millum annað sagt, at tað ofta eru lærarar uttan linju í lærugreinini, ið verða settir at undirvísa.

Ein faklærari hevur ein serkunnleika innan sítt fakøkið, sum tryggjar, at næmingarnir fáa fjøltáttaða undirvísing við fakligari dýpd og stigvøksti. Lærugreinarnar í praktiska og estetiska lærugreinaøkinum hava týdning fyri persónligu menningina og sosialu- og kognitivu førleikarnar – tað er júst tað, sum faklærarin dugir at tilrættisleggja. At tað eru *kreativ* fólk, sum undirvísa uttan at hava linju í lærugreinini, førir ofta við sær, at undirvísingin gerst tilvildarlig og fakliga grunn. Sum Bamford nevnir í síni rapport, so kann tað vera beinleiðis skaðiligt fyri læringina hjá næmingunum.

Faklærarin hevur stóran týdning fyri, at lærugreinin verður tikin í álvara, bæði av næmingum og leiðslu. Faklærarin hevur bæði áhuga, ágrýtni og førleika at undirvísa, og tað smittar av á næmingin. Tí eigur tað, har tað er møguligt, bert at vera faklærarar, ið undirvísa í praktisku og estetisku lærugreinunum. Sami trupulleiki var eisini galdandi, tá Bamford gjørdi sína kanning í 2012:

> "Starvsfólk í skúlanum mugu samstarva fyri at menna skipaða, dygdargóða undirvísing í list. Málini í námsætlanini eru høg, men í roynd og veru kann undirvísingin vera ógvuliga vánalig. Á nøkrum flokksstigum hava næmingar so at siga onga undirvísing í list."
>
> "Í fleiri førum verða ein ella tveir lærarar settir at taka sær av lærugreinini, bara tí at teir vera hildnir at hava áhuga í list, ella tí at teir hava glopp í tímatalvuni."
>
> (Bamford, 2012)

## Førleikamenning

Arbeiðsbólkurin vísti eisini á, at tey sakna longri førleikamennandi skeið í síni lærugrein, t.d. sum eftirútbúgvingartilboð á Námsvísindadeildini. Stuttu íblástrarskeiðini og lærugreinadagarnir í Námi eru góð, men ikki nóg mikið.

## Tann góða undirvísingin

Heldigvís hava vit eldsálir úti á skúlunum, ið veruliga gera sítt til at fáa praktiska og estetiska lærugreinaøkið at virka á teirra skúla, hóast karmarnir ikki eru teir bestu. Arbeiðsbólkurin vísir á nøkur ting, ið mugu vera til staðar fyri, at talan kann vera um dygdargóða undirvísing.

1. **Ein leiðsla, ið gongur á odda**
   Arbeiðsbólkurin vísir á, at har tað riggar, er ein leiðsla, ið veruliga raðfestir lærugreinaøkið og sær virðið í lærugreinunum. Leiðslan tryggjar, at tímar eru settir av til lærugreinarnar, samstundis sum hon setir faklærarar á lærugreinarnar.

2. **Faklærarin**
   Um dygd skal vera í undirvísingini er umráðandi, at lærarar við røttum førleikum vera settir at undirvísa. Ofta vera lærararnir settir á t.d. myndlist, tí tey eru *kreativ* ella hava glopp í tímatalvuni. Hetta sæst aftur í dygdini í undirvísingini. Somuleiðis siga lærararnir, at næmingarnir skjótt lesa av, um lærarin brennir fyri lærugreinini, og tað ávirkar áhugan hjá næminginum. Ein faklærari kveikir áhugan og dugir at tilrættisleggja undirvísingina við stigvøkstri, handaligari førleikamenning og mentanarligum innihaldi.
3. **Tíð og umstøður**
   Teir skúlar, ið fáa lærugreinirnar at virka, seta meira tíð av til lærugreinarnar. Dømi um hetta er m.a., at ein skúli fær kommununa at gjalda fyri eyga tímar í tónleiki. Ein annar skúli hevur m.a ein eyka faklærara inni til allar tímarnar í myndlist, sum tey kalla hølislærari.
4. **Næmingatal**
   Allar praktisku og estetisku lærugreinirnar krevja nógva *ein til ein* undirvísing, og tí er umráðandi, at næmingatalið ikki er ov høgt. Arbeiðsbólkurin nevnir, at ofta er eitt mark sett á 12 næmingar, men at hetta átti at verið lægri.
5. **Førleikamenning**
   Lærararnir vísa á, at førleikamenning í praktiska og estetiska lærugreinaøkinum eigur at hava hægri raðfesting.
6. **Undirvísingartilfar**
   Í praktiska og estetiska lærugreinaøkinum er lítið og einki undirvísingartilfar ment. Lærararnir menna sítt egna undirvísingartilfar, hetta tekur bæði tíð og orku, og hevur tað við sær, at undirvísingin er sera ymisk frá skúla til skúla. Arbeiðsbólkurin vísir á, at tað hevði verið ein stór hjálp, um undirvísingartilfar var at halda seg til, serliga hjá teimum, ið ikki hava linju í lærugreinini.

# Uppskot um broytingar

Um vit skulu loysa trupulleikarnar, mugu nakar ávísar broytingar fremjast. Hesin parturin vísir á broytingar, ið kunnu at loysa nakrar av trupulleikunum, ið eru í lærugreinaøkinum.

Á verkstovudøgunum á Føroya fólkaháskúla arbeiddi arbeiðsbólkurin við at nýhugsa praktiska og estetiska lærugreinaøkið við støði í *tí góða døminum*. Hugt var eftir, á hvønn hátt lærugreinaøkið kann skipast, soleiðis at dygd kann fáast í hvørja lærugrein sær, og hvussu vit kunnu tryggja ein reyðan tráð við stigvøkstri gjøgnum øll 9. flokksstigini. Uppskotini um broytingar eru sostatt við støði í teirra hugsanum um, á hvønn hátt teirra fakøkið kann lyftast fakliga.

## Tíma- og lærugreinabýtið

Allir lærararnir á verkstovuni á Føroya fólkaháskúla vístu á, at tíðin til hvørja lærugrein er ov stutt. Um dygd skal fáast í lærugreinirnar má tímatalið upp.

Hyggja vit eftir verandi tíma- og lærugreinabýti fyri praktisku og estetisku lærugreinarnar, sær tímabýtið soleiðis út:

| Handaverk og list | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 14 | Sangur og tónleikur, tilevning, handarbeiði, smíð og heimkunnleiki | | | | | | | | | | |
| | | 2 | 2 | 4 | 5 | 4 | 5 | 2 | | | 25 |

Av tí at tímabýtið fyri praktisku og estetisku lærugreinarnar verður givið fyri allar fimm lærugreinarnar í einum, kann tað tykjast trupult at fáa eyga á ítøkiligu trupulleikarnar. Um vit pakka lærugreinarnar í *handaverk og list* út, sær býtið soleiðis út:

| Lærugrein | 1 fl | 2 fl | 3 fl | 4 fl | 5 fl | 6 fl | 7 fl | 8 fl | 9 fl | Tils. | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tónleik | 0,4 | 0,4 | 0,8 | 1 | 0,8 | 1 | 0,4 | 0 | 0 | 4,8 | 185 |
| Myndlist | 0,4 | 0,4 | 0,8 | 1 | 0,8 | 1 | 0,4 | 0 | 0 | 4,8 | 185 |
| Handarbeiði | 0,4 | 0,4 | 0,8 | 1 | 0,8 | 1 | 0,4 | 0 | 0 | 4,8 | 185 |
| Smíð | 0,4 | 0,4 | 0,8 | 1 | 0,8 | 1 | 0,4 | 0 | 0 | 4,8 | 185 |
| Heimkunnleika | 0,4 | 0,4 | 0,8 | 1 | 0,8 | 1 | 0,4 | 0 | 0 | 4,8 | 185 |
| | 0,4 = 24 min | | | | | | | | | | 925 |

Sum áður nevnt verður hetta ikki útint úti á skúlunum. Um vit seta tølini inn, sum *oftast* eru at síggja á tímatalvuni, sær veruliga tímatalið soleiðis út:

| Lærugrein | 1 fl | 2 fl | 3 fl | 4 fl | 5 fl | 6 fl | 7 fl | 8 fl | 9 fl | Tils. | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tónleik/sang | 0,75 | 0,75 | 0,75 | 0,6 | 0,6 | 0,6 | 0,3 | 0 | 0 | 4,37 | 168,6 |
| Myndlist/tilevning | 0,75 | 0,75 | 0,75 | 0,6 | 0,6 | 0,6 | | 0 | 0 | 4,05 | 156,3 |
| Handarbeiði | | | | 0,6 | 0,6 | 0,6 | | 0 | 0 | 1,8 | 69,5 |
| Smíð | | | | 0,6 | 0,6 | 0,6 | | 0 | 0 | 1,8 | 69,5 |
| Heimkunnleika | | | | 0,6 | 0,6 | 0,6 | | 0 | 0 | 1,8 | 69,5 |
| | Í miðdeildini brúka vit p-fakskipanina. Næmingarnir hava 4 tímar um vikuna, svarandi til 3 klokkutímar.<br>3 klokkutímar deilt á fimm lærugreinar svarar til 0,6 pr. lærugrein. | | | | | | | | | | 533,4 |

Sum talvan vísir, er tíðin til hvørja einstøku lærugrein sera stutt, og næmingarnir fáa ikki tað tímatal, tey annars hava krav uppá sambært fólkaskúlalógini. Tí mæla vit til at pakka lærugreinarnar út, og at seta fleiri tímar inn til praktisku og estetisku lærugreinirnar, so leiðslurnar hava møguleika at halda áseta tímabýtið.

**Mælt verður til at:**

Avtaka *p-fakskipanina,* pakka lærugreinarnar í handaverki og list út og seta fleiri tímar inn.

Tað kemur bæði lærararanum og næmingunum til góðar at avtaka p-fakskipanina. Longda tíðarskeiðið gevur læraranum umstøður at leggja longri undirvísingargongdir til rættis, og tá er høvi til at fáa bæði dygd og stigvøkstur í læringina. Fyri næmingarnir merkir tað at fáa høvi at menna bæði handaligar og fakligar førleikar stig fyri stig. Áhaldandi læringin gevur næmingunum møguleika at fordjúpa seg í eini lærugrein, at síggja dygdina og týdningin í at kenna til okkara mentan, og hon gevur næmingunum møguleika at meistra eitt handverk, at eydnast, og harvið verður sjálvsálitið eisini styrkt og áhugin kveiktur.

Avbjóðingin er so, hvussu hetta skal skipast í verki. Um næmingarnir velja seg inn á lærugreinar, kann verða, at onkur lærugrein ikki hevur nóg høgt næmingatal. Her er ein loysn at leggja árgangirnar saman ella at seta tveir lærarar, har tað er neyðugt.

Tað krevur tilvenjing hjá læraranum at tilrættisleggja longri undirvísingargongdir, tí er neyðugt at menna tilfar og skipa fyri skeiðum í øllum fimm lærugreinunum.

## Frá *heimkunnleika* til *matur & heilsa*

Fyri at fáa dygd í lærugreinina heimkunnleika verður mælt til at taka lærugreinina burtur, og ístaðin verður mælt til eina nýggja lærugrein við heitinum *matur og heilsa*, við nútíðarhóskandi samleika og fleiri tímum. Arbeiðsbólkurin vísti á, at tímatalið er ov lágt til at skipa nakra munagóða læring í *heimkunnleika*. Tí verður mælt til at seta tríggjar tímar av til lærugreinina á 6. og 7. floksstigi.

> **Helsefremjande kosthald**
>
> Gjennom å lage mat og førebu måltid skal elevane få oppleve matglede og utvikle kunnskap om trygg mat og helsefremjande kosthald. Kostråda til helsestyresmaktene er sentrale for undervisninga og elevane skal få forståing for samanhengen mellom næringsstoff og helse og utvikle kompetanse til å kunne velje eit sunt og variert kosthald.
>
> **Berekraftige matvanar og berekraftig forbruk**
>
> Bruk og val av mat påverkar individet, miljøet og verda vi lever i. Gjennom å planleggje måltid og lage mat skal elevane lære å utnytte råvarer og matrestar og forstå at mat er ein avgrensa ressurs, slik at dei lærer seg berekraftige matvanar og blir bevisste forbrukarar.
>
> **Mat og måltid som identitets- og kulturuttrykk**
>
> Kulturen kring mat og måltid er i kontinuerleg endring og er påverka av råvarebruk, kunnskap, tradisjonar og sosiale eller religiøse normer og verdiar. Matlaging og måltid er sosiale arenaer for utforsking, samarbeid og samskaping. Møte mellom matkulturar og kulturelle aktivitetar frå Noreg og andre land fremjar mangfald og opnar for forståing, bevisstgjering og nysgjerrigheit. Slik skal elevane få oppleve matglede saman og slik kan matkulturane våre både fornyast og takast vare på.

Tilmælið til broytingina er við íblástri frá norsku skúlaskipanini, har tey hava góðar royndir við lærugreinini *mat og helse*. Í námsætlanini eru hesi kjarnuøkir: *helsefremjande kosthald, bærekraftige matvaner og berekraftig forbruk, mat og måltid som identitets- og kulturuttrykk.*[6] Námsætlanin er ikki heilt ólík okkara *heimkunnleika*[7]. Tó sæst týðiligur munur á, at tey í Norra hava sera greið ávegismál, meðan

[6] https://www.udir.no/lk20/mhe01-02
[7] https://namsaetlanir.fo/folkaskuli/heimkunnleiki

føroyska námsætlanin bert hevur førleikamál fyri 8. og 9. floksstig. Størsti munurin er tó, at tey í Norra hava bæði faklærarar og fleiri tímar til lærugreinina.

## Fyrimunir og vansar

Fyrimunurin við at leggja tríggjar tímar samanhangandi er, at tað verður pláss til ástøðiliga partin og longri undirvísingargongdir – sum er tað, sum faklærararnir sakna.

Ein vansi við at seta hugsaða dømið í verk er, at næmingarnir sostatt missa *heimkunnleika* á 1. – 5. floksstigi. Tó er broytingin ikki so stór, tí heimkunnleiki er nærum aldrin á tímatalvuni á 1.-3. floksstigi. Arbeiðisbólkurin vísir á, at tað er betri at hava lærugreinina í tvey ár við trimum samanhangandi tímum, har fakligheitin er í hásæti, enn at deila tað út yvir 7 ár við fáum tímum og avbrotnum tíðarskeiðum og lítlari læriúrtøku.

## Tilevning ella myndlist?

Arbeiðsbólkurin vísur á at trupult er byggja nakrar førleikar og skipa stigvøkstur í læringini, tí tey lærugreinirnar eru ov óskipaðar. Tí mæla vit til at lærugreinin *tilevning* er á 1. – 3. floksstigi, og síðani skifta tey til myndlist á 4. – 9. floksstigi.

Her verður lagt upp til, at *tilevning* verður lærugrein, ið fyrireikar næmingin til myndlist, handarbeiði og smíð í miðdeild. Førleikamálini í hesi lærugrein eiga sostatt at geva næmingunum grundleggjandi førleikar og arbeiðslag í hesum lærugreinum - bæði ástøðiliga og handaliga.

Tað merkir, at tað má gerast greiður munur á lærugreinini *tilevning* og lærugreinini *myndlist*.

## Fyrimunir og vansar

Fyrimunurin við at skipa tilevning á nýggjum er at tryggja, at allir næmingar í fólkaskúlanum fáa grundleggjandi førleikar í list og handverki, sum tey kunnu byggja víðari á í mið- og hádeild. Hesin leisturin hevði tryggjað, at leiðslurnar brúka sama leist – altso verður tað ikki longur tongt at hvørjum skúla tú gongur í.

Tá lærugreinin skal skipast á nýggjum, er umráðandi, at lærararnir lofta teimum broytingum, tað inniber. Tað merkir t.d., at lærarar mugu fáa førleikamenning, umframt at Námsvísindadeildin má tillaga innihaldið í teirra linjugreinum, so komandi lærarar hava samsvarandi førleikar.

**Mælt verður til at:**

Avtaka heimkunnleika sum lærugrein og skipa nýggja lærugrein við heitinum matur og heilsa á 6. og 7. floksstigi.

Leggja tilevning við grundleggjandi førleikum á 1.- 3. floksstig.

Leggja myndlist við dagførdari námsætlan á 4. – 7. floksstig.

Bjóða faklærarunum førleikamenning.

## Praktisku og estetisku lærugreinarnar í hádeild

Sum áður nevnt, so er lagt upp til at skapa javnvág millum náttúruvísindi, hugvísindi og skapandi lærugreinirnar. Sum nú er, hava lærugreinarnar í praktiska og estetiska lærugreinaøkinum avbjóðingar í hádeildini. M.a verða lærugreinarnar týskt og/ella alis- og evnafrøði lagdar samstundis sum praktisku og estetisku lærugreinarnar á tímatalvuni,

